## Flýggja til Avstralia

Avstralska sjóverjan hevur tikið umleið 100 flóttafólk upp av einum skipi í Indiska Havinum. Alt fleiri flóttafólk royna at sleppa til Avstralia við báti ella skipi, og higartil í ár hevur avstralska sjóverjan steðgað 26 bátar og skip við umleið 1.400 flóttafólkum. Tey flestu flóttafólkini eru úr Irak, Sri Lanka, Afghanistan og Iran, men tey sleppa ikki í land í sjálvum Avstralia. Ístaðin fyri verða tey flutt til avstralsku oynna Christmas Island, sum er einar 1.400 fjórðingar úr avstralska meginlandinum, skrivar Reuters.



## Fjaldi lík í seks ár

Í amerikanska statinum Florida hevur ein kvinna í sekstiárunum fingið eitt árs fongsul fyri at hava fjalt líkið av mammu síni heima við hús í heili seks ár. Myndugleikar og trygging vistu einki um, at mamman var deyð, og hon fekk tí pensjón øll árini umframt pensjón hjá manninum, sum hevði arbeitt í herinum. Talan var um tilsamans 230.000 dollarar, sum dótturin so gjørdi sær dælt av, skrivar AP. Í rættinum gjørdi dómarin av, at kvinnan skal sita eitt ár í fongsli, og harafturat skal hon rinda hvønnj einasta dollara aftur - við rentum.

# Friðingarmyndugleikin seinkaði Leynatunlinum

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna, vera eina av orsøkunum til, at arbeiðið í tunlinum tók so langa tíð. Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, setti henni ein grein 52 spurning í sambandi við umvælingararbeiðið í tunlinum.

Kári P. Højgaard spurdi landsstýriskvinnuna, hvussu stór upphædd upprunaliga varð mett, at kostnaðurin fór at verða av at gera neyðugu ábøturnar á Leynartunnilin. Annika Olsen svara, at upprunaliga kostnaðarætlanin var 15 milliónir krónur. Men nú hann er um at vera liðugur, er samlaði kostnaðurin 17,3 milliónir krónur.

Kári P. Højgaard spurdi eisini, hvør orsøkin er til, at ljósini, sum sett vóru tunnilin og tendrað, eftir stutta tíð vórðu sløkt aftur. Til hetta sigur landsstýriskvinnan, fyri at spara um raksturin, var ein serlig ljósskipan sett upp, ið ikki varð roynd í Føroyum áður.



Nakrar barnasjúkur hava verið orsakað av vantandi royndum við hesi skipan, men nú skuldi trupulleikarnir verið loystir.

Hon sigur eisini, at ein grund til, at arbeiðið dróg út, var, at teknikhúsini við tunnilsmunnarnar kravdu loyvi frá friðingarmyndugleikunum. Hetta loyvi er nú fingið.



# Faroe Ship selt Sirius

SKIPASØLA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Farmaskipið m/s Sirius hjá Faroe Ship, sum hevur ligið við bryggju á Skála í nakrar mánaðir, er nú selt einum felag í Hollandi.

Sirius varð bygdur í Noregi í 1972. Skipið er 60 m langt og hevur ein lastakapasitet upp á umleið 1680 rúmmetrar.

Skipið hevur siglt við fóðri og øðrum farmi í Føroyum og í Norðurevropa.

Áðrenn skipið fer í vinnu aftur, skal tað klassast og umvælast í Hollandi. Síðani fer Sirius í farmasigling millum Holland og Vesturafrika.

Skipsmeklaravirkið MARETEC á Argjum skipaði fyri søluni.

# Tveita 110 milliónir krónur burtur

**- Formenninir í ABC flokkunum hava ábyrgdina av, at tað fer at svíða so fæst hjá fólki, nú sparingar verða gjørdar á fíggjarlógini. Teir hava júst tveit 110 millónir krónur av vælferð út gjøgnum vindeyga, sigur Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður, sum vísir á, at sum er, táttar holið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010 í milliardina**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Vælferðin í Føroyum verður skerd meira enn neyðugt næsta ár. Tað er avleiðingin av, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í gjár tók ta sera illa umhugsaðu avgerð, at ríkisveitingin framvegis skal verða fastfryst, sigur Edmund Joensen.

- Í veruleikanum hevur landsstýrismaðurin tveitt fyri 110 milliónir krónur av vælferð út gjøgnum vindeygað. Hetta fer at svíða hjá veikum bólkum í samfelagnum og innan almenna sektorin, tá sparingarnar fara at raka við fullari megi komandi ár, sigur løgtings- og fólkatingsmaðurin.

Hann vísir á, at holið í fíggjarlógaruppskotinum, sum í næstum skal viðgerast aftur í Løgtinginum, eftir øllum at døma framvegis táttar í einar 700-800 milliónir krónur.

- Ábyrgdarpolitikarar hava í dag eina høvuðsuppgávu. Tað er at tryggja Føroyum so nógvar krónur í inntøkum sum gjørligt. Teir, sum í gjár tryggjaðu sær, at fastfrystingin av ríkisveitingini stendur við, eru ikki sína uppgávu og ábyrgd vaksnir, sigur Edmund Joensen.

Fastfrystingin av ríkisveitingini kostar umleið 110 milliónir krónur hvørt ár. Hetta er peningur, sum eigur at koma beint inn á føroysku fíggjarlógina. Danska stjórnin boðaði longu í mai í ár frá, at hon er sinnað at viðgera spurningin um at strika fastfrystingina, um ein áheitan kemur úr Føroyum, vísir Edmund Joensen á.

- Henda áheitan kemur tíverri ikki, og tað fer at kosta vælferð komandi ár, sigur hann.

Løgtings- og fólkatingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum undirstrikar, at samgonguskjalið hjá ABC-samgonguni er eingin forðing fyri at tiðna blokkin aftur.


Garnasótt

Koppingarevni fyri garnasótt kann heintast á apotekunum, sum fráboðað í brævi til kundar okkara, frá hósdegi 24.september 2009.

Broytingar í skamtatali v.m. skulu fráboðast Tjaldurs Apotek tlf. 341100 ella við telduposti til: ordrad@apotek.fo.

Apoteksverk Føroya
og
Landsdjóralæknin